# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Martina Petersen á Kósini, Klaksvík**, andaðist á sambýlinum á Heygnum sunnudagin 90 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Chistianskirkjuni, mikudagin kl. 13.30.

**Petur Jacob Vágsá,** vanliga nevndur Piddi í Búðinum, Klaksvík, andaðist í heiminum sunnudagin 23. november, 62 ára gamal. Farið verður úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikukvøldið kl. 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13.30. Sungið verður úr sálmabókini.

Kistan við **Jacobinu Sørensen**, ættað úr Hvalba, búsitandi í Havn, fer av Lágargarði týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin 26. november kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Jacobinu kunnu lata Lágargarði eina gávu.

†

Kunngjørt verður fyri, ætt, vinum og kenningum,
at kæri bróðir, svágur, mammubeiggi
og pápabeiggi okkara

**Peter Jacob Vágsá**
Piddi í Búðinum, Klaksvík

andaðist sunnudagin 23. november, 62 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni
hósdagin 27. november kl. 13.30.

*Fyri tey avvarðandi*
**Selma, Kristin og Simona**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá kæra mamma, vermamma, og omma okkara

**Oleanna Solveig Michelsen**
Tvøroyri

andaðist og var jarðað.
Tøkk til eldrasambýlið á Tvøroyri, Suðuroyar sjúkrahús, Jónsvein Bech, prest, kirkjutænarar, berarar, sangarar, gravara, og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar, gávur til missiónshúsið, og tit, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Niels Harald, Jón og Rói**

**Dagurin**
**25. november. Katrin**, deyð umleið ár 300. Halgisøgurnar greiða frá eini vakrari og klókari prinsessu í Aleksandriu, sum mangir hábornir menn bóðu um. Navnið er grikst og merkir hin reina, hin óspilta.

# Vestmanna kirkjukór adventshugna



Sunnudagin tann 11. desembur kl. 19.00, sum eisini er fysti sunnudagur í advent, skipar Vestmanna Kirkjukór saman við Vestmanna kirkju fyri adventshugna í Vestmanna kirkju.

Nógv tey seinastu árini hevur Kirkjukórið skipað fyri hesi hugnaløtu, og aftur í ár er hugnaløtan í kirkjuni á skránni.

Á skránni verður, tónleikur, kórsangur og felagsangur o.a.

Gestasangari í ár er James Olsen, ið syngur nøkur løg saman við kirkjukórinum.

Vestmanna Kirkjukór, sum telur uml. 30 fólk og er undir leiðslu av Erlu Olsen, kemur eisini at framføra nakrar sangir.

Hini árini hevur kirkjan verið meir enn full, og tí verður heitt á fólk, um at møta stundusliga til hugnaløtuna í krikjuni.

Aftaná sangin í sjávari kirkjuni er ein drekkamunnur at fáa í kirkjukjallaranum.

Øll eru vælkomin.

# Jól á Posthúsinum




Nú eru jólamerkini og aðrar jólavørur at finna á posthúsunum kring landið

Jólamerkini í ár ímynda einglar, sum Astrid Andreasen hevur klipt. Einglarnir eru 30 í tali og eru teir allir ymiskir. Avlopið av jólamerkjasøluni fer óskert til jólamerkjagrunnin, sum ger eitt stórt arbeiði fyri børn og ung í Føroyum. Einglarnir prýða somuleiðis ársins jólakort.

Postverkið er farið undir eina røð av jólaprýði. Myndevnið er ársins jólamerki, og eru fimm av einglunum gjørdir til jólaprýði, ið eru úr messingi og lagt við 24 karat gulli. Einglarnir eru umleið 8 cm til støddar, og liggja í eskjum.

Ársmappan og árbókin við øllum ársins frímerkjum eru eisini at finna á posthúsunum kring landið.

# Kiwanishjálmar til skúlabørn

Teir sonevndu Kiwanishjálmarnir verða í hesum døgum koyrdir út til skúlar kring landið.

Kiwanis hevur í fleiri ár latið súkkluhjálmar til skúlabørn.

Tað eru Kiwanisklubbarnir Kiwanis Tórshavn, Kiwanis Rósan og Kiwanis Eysturoy sum standa fyri klárgering av hjálmunum við klistrimerkjum og at koyra teir út til skúlarnar.

Tað eru knapt 700 skúlabørn, sum fáa ókeypis Kiwanishjálm á hvørjum ári.

Sponsorar eru Tryggingarfelagið Føroyar, Trygd, Faroe Ship og RFF.




*Her eru tað skúlabørn í Vestmanna sum hava fingið Kiwanishjálmar*

*Mynd: Sámal Bláhamar*